# Fimtan nýggjar sendingar til almenna útvarpið

**Útvarp Føroya trongir til at endurskoða sendiskránna. Stovnurin sendir nógvan góðan tónleik, undirhald og prát í ymsum útgávum og nógv tíðindi. Men okkara elsti loftmiðil má eisini geva lurtarunum betri innlit í samfelagið, heimin og lívsins mongu spennandi spurningar. Hann má upplýsa og ikki bara undirhalda. Hetta krevur, at stovnurin gevur kreativitetinum og journalistisku førleikunum rásarúm og miðvíst fer at menna nýggjar innihaldsríkar sendingar**



KRONIKK

*Uni Arge, journalistur*

Í sendingini Vespuni fríggjakvøldið 7. november hevði eg eitt innlegg um upplýsingarstøðið í føroyskum fjølmiðlum. Mín pástandur var, at vit fáa ov lítið at vita frá fjølmiðlunum. Tað mesta, sum sent verður, serliga í útvørpunum, er tónleikur, prát og undirhald. Ein stórur partur av restini er skjótt gloymd dagsaktuell tíðindapettir um politiskar og umsitingarligar bardagar.

Eg eftirlýsti í mínum innleggi innihald og tilvitandi journalistikk, sum perspektiverar, útgreinar og greiðir frá. Í hesum sambandi vísti eg á fleiri senditættir, sum kundu verið á skránni í almenna útvarpinum ella kanska eini heilt nýggjari upplýsingarrás. Eg nevndi hesar senditættirnar í stuttum yvirskriftum. Í hesi greinini ætlaði eg at útdýpa mínar tankar.

Kringvarpslógin sigur, at ÚF skal útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan - og undirhald. Men fyri mær at síggja ger ÚF lítið við at skapa nýggjar upplýsandi og mentanarligar sendingar. Journalistisku medarbeiðararnir gera mestsum bara tíðindi. Hetta sæst aftur í skránni, tí av teimum 110 tímunum, sum ÚF sendir um vikuna, eru 80-85 tímar tónleikur, hugnaprát og endursendingar. Tað er nógv fyri ein miðil, sum skal vera dyggur upplýsingarmiðil.

Eftir mínum tykki er tað óheppið fyri tað upplýsandi demokratiska orðaskiftið, at hugnatilfarið skal fylla so nógv, sum tað ger. Tann áhaldandi journalistiska endurnýggingin er ikki til. Tann innlitsskapandi samrøðan er tagnað. Vanligt vit og skil og avkláring um, hvat er tómur retorikkur, og hvat er veruleiki í eitt nú politikki, fær onga veruliga rúmd. Hví? Tí ÚF letur nærvørpini taka seg av fótum?

Í eini roynd at styðja upp undir innihaldsliga uppfinnsemið loyvi eg mær her at leggja fram 15 uppskot um senditættir, sum konsept kundu verið gjørd burturúr, og sum ÚF so líðandi kundi farið og ríkað lurtararnar við. Senditættirnir hava fingið heiti. Teksturin undir heitunum sigur, hvat teir kundu snúð seg um, hví teir kundu verið áhugaverdir osfr. Uppskotini eru hesi:

### 1. Búskapur og pengar

Støðan í búskapinum og fíggjarligir spurningar eru allatíðina viðkomandi. Í sendingini kundi búskaparstøðan í landinum og heiminum verið viðgjørd. Nógv taltilfar um búskap er til taks, síðan fíggjarambоðini hjá tí almenna gjørdust framkomin, og ástøðiligu hugsanirnar um evnið eru ymiskar. Ávirkanir av búskapargongdini kunnu verða lýstar, eitt nú keypiorka, bústaðarmøguleikar, byggivirksemi, íløguhugur og tílíkt. Eisini landsgrannskoðanin kundi fingið gjølliga umrøðu.

### 2. Lærdómur í nýggjari øld

Unga ættarliðið er samfelagsins framtíð, og undirvísingin hevur tí stóran týdning fyri samfelagið. Hvørjar tankar gera skúlar sær um tørvin hjá næmingunum, og hvat krevja næmingarnir av skúlunum? Hvussu er pedagogikkurin í dag samanborið við fyrr? Eru næmingarnir betri og upplýstari? Broytir tøkniliga menningin undirvísingina? Sendingin kundi viðgjørt fólkaskúlan, miðnámsskúlar og hægri útbúgvingar. Eisini tekniskar útbúgvingar skuldu havt innivist.

### 3. Miðlameldurin

Eitt programm um miðlar í øldini, sum verður rópt kunningarøldin, man vera upplagt. Miðlarnir eru okkara størsta frítíðarítrív, um so talan er um sjónvarp, útvarp, bløð, internet ella film av ymsum slag. Hvussu ávirka fjølmiðlarnir okkum? Hvussu brúka vit teir? Nú kunningin við tøkniligum framstigum er so nógv økt, eru vit betri upplýst ella meiri ørkymlað? Ein sovorðin sending kann eisini viðgera miðlavanar, umstøður hjá miðlum, reklamu, telefoni og kunningartøkni.

### 4. Millum dalar og fjøll

Náttúrupplivingar og arbeiði í náttúruni sigast at stimbra sálina. Útvarpssendingar um evnið hava fyrr ríkað nógv fólk, og onkur sending er viðhvørt, sum umrøður virksemi í náttúruni. Millum dalar og fjøll í Føroyum fer so mangt áhugavert fram, sum fólk kenna aftur ella vilja hoyra um, at tilfar ivaleyst er til eina náttúrusending alt árið. Hugvekjandi reportasjur frá ferðum ymsastaðni kring oyggjarnar til gongu, á hestabaki ella í báti kundu verið gjørdar í hesum senditátti.

### 5. Hav og fiskur

Meginútvarpið í einum landi, sum livir av fiski, má hava ein fiskivinnutátt, har alt tilfarið um fisk, sum vanliga longir óneyðuga nógv um tíðindasendingarnar, fær innivist og verður gjølla viðgjørt. Í sendingini kunnu spurningar um stuðul til fiskivinnuna, skipanin við fiskidøgum, endurnýgging av skipaflotanum, útróður, støðan í alivinnuni og rækjuvinnuni, umstøðurnar hjá sølufyritøkum og marknaðarviðurskifti verða viðgjørd.

### 6. Søguliga sjónarhornið

Søguligar framløgur av ymsum samanhangum eru neyðugar, tí søgan er støðið undir tí, sum hendir nú. Til dømis kundu journalistar gjørt sendingar um, hví ófriður altíð er í Miðeystri, hvussu USA gjørdist stórveldi, hvussu fiskivinnusamfelagið Føroyar kom á føtur, hvussu Irak gjørdist einaveldi, hvussu norðbúgvar funnu Amerika osfr. Rúgvan av heimligum og útlendskum søguligum evnum er ótømandi. Samrøður við søgufrøðingar eru hóskandi í hesi sending. Eisini skrivaðar frásagnir.

### 7. Siðir og samtíð

Atferð, uppfatanir og moralur broytast, sum tíðirnar broytast, og tað, sum var rætt fyrr, er kanska skeivt í dag. Fólkalívsfrøðin granskar í hesum viðurskiftum, og tá fólkalívsfrøðingar hendingaferð greiða frá siðum fyrr og nú í samrøðum í ÚF, vekir tað stóran áhuga millum fólk. Hvussu broytist liviháttur okkara í nýggju tíðini? Hvørji eru okkara mest avgerandi lívsvirðir? Aftrat serfrøðingum kunnu ung og eldri siga sína hugsan um broytingar í tíðini.

### 8. Heimskortið

Summar gamlar útvarpssendingar verða seint gloymdar. Ein er sendingin, har Hans Holm plagdi at greiða Sonna Smith frá heimsins londum og fólkasløgum. Kunnleiki um heimin og onnur fólk skapar tilvitan um tað, sum rørist uttan fyri eingjargarðarnar. Ein sovorðin sending er tí ivaleyst altíð viðkomandi. Ein máti at geva sendingini natúrligt framhald kann vera at fáa fólk, ið hava búð uttanlands, ella fakfólk at greiða frá einum ávísum landi og tess mentan hvørja ferð.

### 9. Heilsa og trivnaður

Heilsustøðan hjá fólki ávirkar, hvussu nógvan pening landið brúkar uppá at viðgera sjúkur. Verri heilsustøðan er, meiri umfatandi gerast trupulleikarnir. Upplýsing um góðan livihátt, kost og rørslu virkar fyribyrgjandi, siga tey kønu, men lítið hoyrist til hesa upplýsing í ÚF. Ein sending við tílíkum innihaldi skuldi eisini viðgjørt arbeiðsumhvørvi, strongd, sálarfrøði og svarað ymsum ivamálum um heilsu. Serfrøðingar finnast nógvir at styðja seg til hjá journalistunum.

### 10. Føroyingar og ferðing

Ferðslutættir hava onkuntíð verið sendir, sum hava verið áhugaverdir og upplýsandi. Teir eru eisini altíð viðkomandi, verður hugsað um, hvussu stórir skaðar viðhvørt standast av vanlukkum í ferðsluni. Ferðslutættir fyrr hava mest snúð seg um bilferðslu. Men hesin kundi verið víðkaður til onkuntíð eisini at umfatað bátaferðslu, skipaferðslu og flogferðslu. Stutt og greitt ein sending, ið snarar rundan um flutning. Ferðafrásagnir kunnu krydda sendingina.

### 11. Máltátturin

Sendingar um mál eru turrisligar, halda summi, meðan onnur fáa ikki nóg mikið av at hoyra nýtt um málið. Málið er partur av okkum og skapar okkum í stóran mun, og evnið er tí altíð viðkomandi. Nýggjar orðabøkur, sum ikki eru so málreinsandi sum tær gomlu, eru komnar á marknaðin seinnu árini, og upplagt er tí at skipa fyri orðaskiftum í sendingini, ið kunnu vísa, hvagar málið fer. Fremmand mál, málsøga og málið sum samskiftisamboð í telduøldini eru uppløgd evni at umrøða.

### 12. Stýrt og stjórnað

Hóast meiningarnar eru ymiskar, skerst neyvan burtur, at vit liva í eini rembingartíð stjórnarliga. Heimastýrislógin er ikki longur nøktandi, siga allir flokkar, og hon skal ætlandi dagførast, so hon gerst rúmari. Vit fáa kanska eina evstulóg. Danska grundlógin skal broytast. ES verður støðugt útvíðkað. Yvirskipað stjórnmál sum hesi kundu verið viðgjørd her. Samspælið millum land og kommunur, avgerðir hjá umboðsmanninum og umsiting av ymsum slag kundu eisini verið viðgjørd.

### 13. Høvundar hittast

Her kundu rithøvundar saman við journalisti sum verti hitst at skift orð um føroyskar bøkur og heimsbókmentir. Hvørjar vóru týdningarmestu føroysku bøkurnar í farnu øld og hví? Hvørji eru størstu verkini í heimsbókmentunum og hví? Høvundar hava neyðuga innlitið í hesar spurningar til at geva lurtarunum neyðuga innlitið. Upplestur, frásagnir um tað nýggjasta ella kanska elsta úr bókmentaheiminum og ummæli eru sjálvsøgd í hesi sending.

### 14. Brúkarin

Fyri einum ári síðan sendi ÚF fýra brúkarasendingar. Tær gjørdu stóra lukku, tí tær vóru væl gjørdar og viðkomandi. Brúkaratilfar er tilfar fyri øll, tí øll eru onkursvegna brúkarar. Ivaleyst er neyðugt at kanna prísir og góðsku á vørum og tænastum, so nógv hevur keypsmentanin tikið seg fram, og so ágangandi kunnu lýsingarherferðirnar mangan vera. Brúkarar og handilsfólk skuldu sjálvandi komið til orðanna í sendingini.

### 15. Sosiala støðan

Sosialráðgevarar uppliva mangt og hvat, sum sjáldan kemur undan kavi alment, men sum er líka sjálvsagdur partur av samfelagnum sum bráðvakra framsíðan. Hvørji eru illa stødd í samfelagnum, og hvørjir eru teirra trupulleikar? Hví er so trupult at veita øllum eitt mannsømiligt lív, og hvat kann gerast betri fyri tey, sum illa fáa gerandisdagin at hanga saman? Hvat við lógarverkinum og rættindum hjá illa støddum? Hesum spurningum kann sosialtátturin svara.

Tað sigur seg sjálvt, at allir hesir senditættirnir kunnu ikki setast á skránna í senn. Tað hevði kravt alt ov nógva orku. Men bara 2-3 sovorðnir fastir tættir høvdu gjørt góðan mun og hækkað upplýsingarvirðið munandi. Av tí, at "Tilvera" finst frammanundan, havi eg ikki nevnt nakra sending við eksistensiellum innihaldi. Men ein táttur sum "Tilvera"er sjálvsagdur.

Í yvirlitinum havi eg heldur ikki nevnt, at journalistar sjálvandi kunnu gera staksendingar um ávís viðkomandi evni. Staksendingarnar kunnu vera vanligar journalistiskar dokumentarsendingar um evni, ið krevja neyva viðgerð. Hetta kunnu vera uppsøkjandi, útgreinandi ella bara frágreiðandi sendingar, sum vit kenna frá útlendskum fjølmiðlum.

Ein upplýsingarmiðil sum almenna útvarpið skal í størst møguligan mun endurspegla samfelagið og tíðina nú, tá og komandi. Hann er tí ikki bara ein sendari, sum skal forsøta okkum høvd og hjarta við túnatosi og tónleiki. Hann hevur samfelagsliga ábyrgd. Hann skal í demokratiskum ørindum skapa tilvitan um tað, sum fyriferst í samfelagnum og menniskjunum heima og úti, og hann skal gera tað á dygdargóðan og spennandi hátt.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Sverri Biskupstø:

## Seinasta starvsdag hjá Føroya Tele



Hósdagin 27. november fylti Sverri Biskupstø, byggifrøðingur, í Havn, 67 ár, og var hetta samstundis hansara seinasti starvsdagur hjá Føroya Tele eftir 32 ár á stovninum.

Sverri er klaksvíkingur, foreldrini vóru Rachel, f. Hansen, og Óli Hans Biskupstø, byggimeistari í Klaksvík.

Sum ungur fór hann til skips og sigldi við fiskiskipum og trolarum. Eisini var hann í Grønlandi.

Síðst í 50-unum fór Sverri til Danmarkar, har hann lærdi til byggifrøðing. Hann arbeiddi eisini eina tíð hjá stóru donsku entreprenørfyritøkuni, Nybygg.

Hann kom heim aftur til Føroya í 1966 at arbeiða hjá byggifelagnum Danberg & Joensen. Senni arbeiddi hann sum sjálvstøðugur arbeiðstakari til hann 1. juni 1971, fekk starv hjá Telefonverkinum í sambandi við automatisering av telefonunum. Hann bleiv settur sum byggileiðari av telefonstøðum og mastrum kring alt landið. Fyrsta uppgávan var at seta upp eina støð á Støðlafjalli.

Hetta arbeiði hevur Sverri røkt, til hann seinasta hósdag fylti 67 ár og fór frá fyri aldur. Hann hevur verið við í eini ómetaliga stórari menning av telefonnetinum í Føroyum.

Sverri er giftur við Beintu, f. Joensen, úr Klaksvík, tey hava búð í Havn síðan 1966 og eiga fýra børn, Marjun, sum býr í Kvívík, Rakul, sum býr í Havn, Jógvan, sum í løtuni er undir útbúgving í Kina og Óluvu, sum býr í Danmark. Beinta og Sverri eiga 9 ommu- og abbabørn.

## Tvíburðar 80 ár



*2. og 3. desember fylla tvíburðasystkini, Petur Jakku og Hannemia 80 ár. Her eru tey og systkjini avmyndaði í barnaheiminum við Kirkjar í Miðvági. F.v. Petur Jakku, Torgerð, Anna, Kem, Elinborg, Hannemia og Ketty*

2. og 3. desember kunnu tvíburðarnir, Peter Jacob Haraldsen í Miðvági og Hannemia Joensen í Klaksvík, halda 80 ára føðingardag.

Foreldur teirra vóru Karin f. Petersen úr Hesti og Heini Haraldsen í Miðvági. Petur Jakku hevur alla sína tíð búð í Miðvági, har hann mest hevur fingist við at reka handil, inntil nakað eftir Ólavsøku í ár.

Honum hevur altíð dámt væl at fingist við vøkstur í urtagarðinum og uppi í Høgagerði. Hann hevur gingið nógv úti í náttúruni og fiska síl á Leitisvatni og Fjallavatni.

Hann hevur verðið við til at givið út í bók við ymsum ritum eftir pápa sín, og fyri tveimum árum síðan gav hann út bókling og tekningar um tað, sum hann minnist frá krígnum.

Aðrar bøkur og rit eru eisini prýddar við hansara tekningum. Eitt nú perman á nýggju lestrarbókini hjá Dávidi Johannesen, presti, sum kom út fyri fáum døgum síðani.

Hannemia giftist við Meinhardt Joensen, skómakara í Klaksvík. Fyrst í 60'unum lótu tey upp skógvahandil í Nólsoyar Pálssgøtu. Seinni skiftu tey skógvarnar um við kioskvørur, og høvdu eisini kiosk umborð á Ternuni, eftir at Meinhardt varð givin umborð á Barsskor. Meinhardt andaðist í 1997. Hannemia gavst at handla fyri tveimum árum síðani.

Hannemia og Meinhardt fingu 3 døtur. Karin gift við Peder Haahr, Sigga gift við David Johannesen og Julianna gift við Olivur Thomsen. Hannemia eigur 8 ommubørn og 3 langommubørn.

Barnaheimið hjá Hannemiu og Petur Jakku er við Kirkjar í Miðvági. Har vuksu tey 7 systkini upp, sum komu undan. Tvey systkin vóru aftrat, Jógvan Pauli og Elinborg, men tey doyðu sum børn.

Elsta systirin, Anna, giftist við Sverra Trónd Hansen í Tórshavn. So komu tvíburðarnir Petur Jacob og Hannemia. Torgerð giftist til Klaksvíkar við Óla Joensen, sála, vanliga róptur Óli bóndi. Ketty giftist við Jákup Olsen í Miðvági. Kem býr í Miðvági, og Elinborg giftist við Andreas Berglíð í Sørvági.

Mamma teirra gjørdist sjúk eftir at tvíburðarnir vóru føddir, og var songjarliggjandi í eini 40 ár. Sjúkan lamdi hana og hon fekk ikki tosað. Hetta hevur uttan iva gjørt sítt til, at systkini altíð hava hildið serstakliga væl saman.

Bæði Petur Jakku og Hannemia eru listafólk, og bæði hava tey grønar fingrar, sum tikið verður til.

Petur Jakku hevur - umframt at tekna og skriva - málað mangar málningar - serliga í samband við Vágoynna og kristintrúnna. Eisini hevur hann gjørt mangan figurin.

Hannemia gjørdist ikki virkið listafólk, fyrr enn hon var farin um tey fimti. Men hon er sera fjølbroytt í síni list, og hevur bæði fingist við at málað málningar, málað og brent postalín, glas og brochur, litað toy og turrikløð, gjørt myndir úr fiskabeini og við steinum.

Ólík eru tey tó eisini. Petur Jakkub hevur altíð verðið meira stillur, meðan Hannemia hevur verðið meira lívlig. Men tey hava hildið væl saman.

Føðingardagarnir verða hildnir í barnaheiminum við Kirkjar í Miðvági leygardagin 6. desember.

## Móðir og dóttir í Ribarhúsi



**Tíðindaskriv**

Møðgurnar Rutt og Ester Hansen hava sera spennandi framsýning í Ribarhús í Fuglafirði frá 4. - 10. desember.

Rutt er 47 ára gomul, heimaarbeiðandi, og eigur 5 børn. Hon hevur havt seyming sum ítriv.

Sum nakað nýtt roynir hon seg við barnaklæðum úr bleytari føroyskari ull. Umframt sera vakrar kjólar vera húgvur og jakkar bæði til gentur og dreingir at síggja.

Ester er 21 ára gomul og hevur málað í nøkur ár. Hon hevur sýnt fram á Varmakeldu áður. Nú er hon farin at royna seg við abstraktari list. Málningarnir, ið eru sera ymiskir í stødd, eru ljósir og tó við ymiskum skuggum. Uppi á loftinum verða náttúrumálningar at síggja, sum Ester eisini hevur gjørt.

Framsýningin letur upp 4. desember. Fernisering verður, har pápi Rutt, Finnur Hansen, ið júst hevur givið fløguna »Undurfulla Land« út, verður við. Eisini verða Mirjam, Vanja, Laila og Barbara at hoyra. Framsýningin er opin frá kl. 15-18.

## Kristina Háfoss prógv sum búskaparfrøðingur



Kristina Háfoss í Hoyvík hevur hin 2. desember 2003 lokið prógv sum búskaparfrøðingur, Cand. Polit, við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

Kristina er tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin, vald í Suðurstreymoyar valdømi. Frammanundan hevur hon hesar útbúgvingar: BA-polit 1998, BA-jur. 2001, og cand. jur. 2002.

### Dagurin

**3. desember. Sveinur.** Teir vita einki halgimenni við hesum navni. Norrønt navn sum merkir *ungur maður*.